# Skattafrádráttur hjá fiskimonnum og altjóðagerðin



**KJARTAN JOENSEN**
løgtingsmaður, valevni á lista A

Framhaldandi eigur at verða arbeitt fyri lægri skattatrýsti á seinast vunnu krónuni hjá tímaløntum og at skatta frádrátturin hjá fiskimanninum verður varðveittur

Fiskivinna á sjógvi og landi er grundleggjandi íkastið til føroyska búskapin.

Altjóðagerðin leggur alt størri trýst á okkum við lágum kostnaðarstøði úr m.ø. Baltalondum, eysturøkinum og Asia.

Fólkaflokkurin sá longu í seinastu øld, at føroyska fiskivinnan kom at standa fyri stórum missi av dugnaligum fiskimonnum, um ikki arbeiðsumstøður og skattafrá-dráttur fyri fiskimenn vórðu framd. Tí var gott, at vit fingu ljóð fyri hesum hjá okkara samstarvsflokkum og fingu hetta framt. Hetta er partur í altjóðagerð!

Ofta tykist, sum um okkara mongu frøðingar síggja málið einstáttað og ikki virka út frá føroyskum heildarsjónarmiði mótvegis londum, sum hava sterkar og dugnaligar ráðgevarar, hesir sum dagliga heilt einfalt eru okkara kappingarneytar.

**Tímalønti og fiskimaðurin**
Útflutningsvinnan, bæði fiskivinna og aðrar vinnur, standa fyri hørðum avbjóðing-um og tær herðast. Tí mugu fortreytirnar hjá okkum verða, at vit hava sjóttarbeiðandi fólk, við góðum arbeiðsumstøðum bæði á sjógvi og landi við lágum skattatrýsti.

Vit eiga framhaldandi at virka fyri, at okkara fólk í høvuðsvinnuni fær minni skatt av seinast vunnu krónuni enn nú, og at skattafrádrátturin hjá fiskimonnum verður varðveittur.

Her fáa vit tvinnar fyrimunir. Annar er, at fleiri krónur liggja eftir hjá tí einstaka arbeiðaranum, og hin, at neyðugt verður helst ikki við so høgum trýsti á at fáa ófak- lærda útlendska arbeiðsmegi, tí okkara fólk sær munandi meiri í at vinna pening.

Sum eg fyrr havi nevnt, eigur framhaldandi at verða arbeitt fyri lægri skattatrýsti á seinast vunnu krónuna, og neyðugt er at fiskimaðurin framhaldandi varðveitir frádráttin.

Hetta fari eg framvegis at leggja dent á. Tí Fólkaflokkurin er lágskattaflokkur.

# Fiskivinnan siglir vandasjógv



**SVENN OLSEN**
Valevni Sambandsfloksins

Fiskivinnan má gerast burðardygg, skipaflotin umhvørvisvinarligur og møguleikar fyri atgongd hjá arbeiðsmegi til føroyska arbeiðsmarknaðin.

Tað er ikki ein spurningur, um tað koma krøv frá fiskakeyparum, spurningurin er, nær krøvini koma

Politiska skipanin má - saman við vinnuni – finna eina skipan, so allur fiskiskapur gerst burðardyggur, tað skal gerast við breiðum politiskum meiriluta, so skipanin heldur meira enn 4. hvørt ár.

Tað sama er galdandi fyri orkunýtsluna. Øll hava áhuga at spara orku. tí fari eg at arbeiða fyri - at vinnan saman við politisku skipanini - setir pengar av til gransking á økinum, so veruligar langtíðar sparingar kunna finnast – baði í útlátið og pengum

Største forðingin fyri framhaldandi vøkstri í okkara búskapi, er manglandi arbeiðsmegi. Allar vinnugreinar mangla fólk, um hettar ikki verður loyst sum skjótast, er vandi fyri at alt steðgar upp, og hvør skal tá gjalda fyri vælferðina?

At leggja um í fiskivinnuni, fer í fyrst atløgu at kosta pengar, men um einki verður gjørt kann vantast at rokningin verður fleiri ferðir størri, tí um einki verður gjørt skjótt, verður ringt at fáa góðan prís fyri fiskin.

Eg fari saman við Sambandsflokkinum at arbeiða fyri at hesi mál vera loyst, skjótt, væl og í sátt og semju við vinnuna.

Breitt samarbeiði gevur haldgóðar loysnir, og hvat skal tá fíggja vælferðina?

# KROSSORÐ



## Vinnari:

*Anna Petersen*
*Á Sondum 35*
*360 Sandavágur*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: VATERPASS

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| V | Á | T | A | K | A | V | I | | S | K | A | L | V | U | R |
| E | S | S | A | N | | A | V | E | T | I | N | | Ø | R | E |
| T | E | | | A | G | | | I | O | N | | E | L | I | N |
| R | Y | T | U | R | | Á | A | R | V | A | T | N | | N | N |
| A | Ð | A | L | V | E | R | K | | U | | E | O | S | | I |
| R | A | N | V | A | | S | V | A | R | T | A | K | Á | L | K |
| 533 | R | N | | R | | V | A | | | E | K | | L | Ø | R |
| I | O | | R | | T | I | V | A | | K | | | D | N | A |
| B | Y | G | D | U | | K | I | R | K | J | A | N | | A | P |
| E | T | A | | S | K | A | T | A | | A | L | T | A | R | I |
| N | I | | S | K | Ø | R | | | S | | I | | | P | |
| | N | M | | | G | U | A | N | T | A | N | A | M | O | |
| I | G | U | L | K | E | R | | Ý | | U | | | O | S | T |
| M | | N | I | K | | | | Á | A | R | F | Ø | R | I | |
| A | L | I | N | | | M | I | R | | U | | L | I | | Æ |
| M | Á | N | A | L | Ý | S | I | | S | M | E | L | T | A | R |

## Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**534**

**Loysunarorðið:** ...........................................

Navn: ...........................................................

Bústaður: .....................................................

Bygd/býur: ....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Heimsatlas**
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Heimsins lond**
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar***
***– bæði innan og uttan skúlagátt***